

sjónvarp

Leygardagin 11. august

15.00 *OL*
19.30 *Tom Sawyer og Huckleberry Finn 2 (13)*
20.15 *Spenningur í Singapore*
21.00 *Síðstu buskmenninir*
21.26 *Olympiadusøgan 1 (3)*
21.45 *Eldorado*
22.30 *Ein dreymur gerst veruleiki 2 (5)*
23.15 *Liðugt*

Sunnudagin 12. august

15.00 *Summarkonsert í Tivoli*
15.45 *Guðstænasta*
19.30 *Vitek*
20.15 *Havørnin*
20.45 *Agatha Christie*
21.40 *Áðrenn eg var føddur*
22æ20 *Solti stjórnar Tjajkowky*
22.40 *Andakt*
22.45 *Liðugt*

Mánadagin 13. august

20.00 *OL*

Leygardag fyri børn kl. 19.30

Tom Sawyer og Hucleberry Finn

Tom og Huckle eru góðir vinmenn, tó at teir eru so ymiskir.

Í sendingini seinast, hitti Tom fyri fyrstu ferð gentuna Becky, sum hann bleiv ógvuliga hugtikin av. So hugtikin, at hann biður hana koma út í skógin at hitta seg. Tey verð »trúlovað«, men til stóra sorg fyri Tom, so heldur sambandið teirra millum ikki so leingi.

Tom gloymir skjótt óeydnu sína við gentuni og hittir Huck og Jim. Teir tosa um, hvussu ein fær kambfjarðar burtur. Jú, teir verða samdir um, at tað skal gerast í kirkjugarðinum um midnátt. Har verða dreingirnir fyri eini óhugnaligari hending..: Meira um hetta í kvøld.

Bernie Coulson hevur leikpartin sum lítlibeiggin hjá Tom. Hann kallast Sid og hevur sum størstu fragd at skapa trupulleikar fyri stórabeiggja. Hann er øvundsjúkur um alt, sum Tom fær av skafti, og tað er ikki altið so lætt hjá teimum báðum at búgva í sama rúmi.

Leygarkvøld kl. 20.15

Spenningur í Singapore


Sendirøðin um Frank Buck, sum hevði til arbeiðis at fanga livandi dýr í frumskóginum og lata hesi til djóragarðar kring um í Europa, eitur á donskum »Ævintýri í Singapore«, og hetta heitið situr eisini betur til innihaldið í sendingini. Tá sendirøðin um Frank Buck skuldi gerast, var tað ógjørligt at nýta umhvørvið í Singapore til hesar upptøkur. Býurin er so nógv broyttur síðan Frank Buck livdi og virkaði har. Tí eru upptøkurnar í Singapore gjørdar í studio í Kalifornia. Nærindis er ein »frumskóg« plantað, sum eisini hevur verið nýtt til aðrar filmar av slíkum slag.

Annar partur í sendirøðini hevur heitið »Sjey lyklar til Singapore«. Frank Buck og vinkona hansara Gloris verða órógvað, tá Frank fær boð um, at vinurin H.H. er rændur. Boðberin verður fyri harðrendum álopi, áðrenn hann hevur givið frágreiðing til Buck, um hvat ið er farið fram, tá H.H. varð rændur.

Seinni kemur fyri ein dag, at tað eru japanarar, sum hava rænt H.H., tí hann av tilvild tók myndir av loyniligu vápnagoymslum teirra. Nú vilja japanarar hava filmin, og teir fara ikki fram eftir fummum...

Sunnudagin kl. 21.40:

Áðrenn eg varð føddur



Sendingin er í innihaldi um hvørja ávirkan uttanumkringstøðurnar hava fyri eitt fostur, síðstu mánaðarnar, áðrenn tað verður føtt. Bjørn Kraglund, ljóðmaður og Joachim Jerrik, sjónvarpsmaður, royna at endurgeva ljóð, sum barnið í móðurlívi uppfatar. Hetta eru ljóð, sum koma frá mammuni og sum sleppa gjøgnum barnið um fosturvatnið.

Sunnukvøldið kl. 20.45

Agathe Christie

Sjónvarpið hevur seinastu tiðina sent framhaldandi sendingar, eftir søgunum hjá Agathu Christie. Hesaferð snýr tað seg um Jane Cleveland (Elizabeth Garvie), sum er arbeiðsleys og fátøk, men vøkur á at líta.

Hon sær lýsing í The Times um arbeiði, sum hon skrivar umsókn til. Av hesum fær hon innlit í eitt umhvørvi, sum er fylt av perlum, politi og gátuførum hertuginnum. Jane er tó ikki bangin, men roynir at finna orsøkina til gátuføru hendingarnar. Hetta ger, at hon kemur í samband við gimsteinatjóvar, sum eru í ferð við at fremja eitt rán.

